# Tingfólk í dýrastu neyð

**Fólkaflokkurin verður avgerandi fyri, um landsstýrismaðurin ella bankastjórin fáa sín vilja í málinum um persónsupplýsingar, sum verða fluttir av landinum. Enn hevur flokkurin ikki tikið støðu í málinum og kanska verður tað útsett**

PERSÓNSVERND
*Ingi Rasmussen*

– Eg skal púra ærliga viðganga, at eg ivist stórliga í, hvat er rættast at gera í hesum málinum, sigur Jógvan á Lakjuni, formaður í Rættarnevndini.

Málið um persónsupplýsingar, sum liggur í løgtinginum, hevur sett tingfólk í eina svára tvístøðu. Rættarnevndin hevur havt fýra fundir um málið. Útvið 20 fólk hava verið inni hjá nevndini og greitt frá sínum sjónarmiðum. Teirra millum umboð fyri Elektron, Føroya Banka, Sparikassan, Tryggingarfelagið, Posthúsið, Dátueftirlitið og landsstýrismaðurin við síni umsiting.

Peningastovnarnir og hini mæla avgjørd frá at samtykkja uppskotið, tí so avbyrgja vit okkum frá umheiminum, siga tey. Landsstýrismaðurin er líka avgjørdur og sigur okkum missa løgræði og vitan av landinum, um vit lata standa til.

## Av landinum

Málið um persónsupplýsingar kom fyri dagin, tá peningastovnarnir fóru undir eina nýggja Gjald-Skipan. Skipanin svarar til ta donsku Betalings-Service, ið loysir gomlu V&T-skipanina í Føroyum av.

Gjaldskipanin hevur við sær, at persónsupplýsingar verða fluttar av landinum. Og tað er ikki í samsvari við tingsins vilja, sambært Høgna Hoydal. Hann ætlaði at steðga nýggju gjaldsskipanini við kunngerð, men av tí at so nógv mótmæltu, legði hann heldur eitt lógaruppskot fram við sama endamáli, so tingið kann geva sína støðu til kennar.

Men tað er ymiskt, hvat tingmenn leggja í tingsins vilja. Eitt nú Javnaðarflokkinum hevur longu gjørt púra greitt, at landsstýrismaðurin umboðar ikki hansara vilja, og eftir øllum at døma sigur Sambandsflokkurin tað sama. Sostatt er líkt til, at tað verður avgerandi, hvat Fólkaflokkurin heldur og ger. Men haðani fæst onki avgjørt svar enn.

– Øll vinnan er ímóti hesum, og tað fær meg at ivast. Skal eg siga akkurát sum er, so er tað ótrúliga ringt at finna útav, hvørjar avleiðingarnar eru, um vit gera hetta ella hatta, sigur Jógvan á Lakjuni, sum hevur sitið og granskað uppskotið langt út á kvøldarnar.

## Ein hoyring

Hvussu verður og ikki. Løgtingið hevur bert stutta tíð eftir av hesari tingsetuni. Spurningurin er tí, um tingfólk eru nóg væl brynjað at taka støðu.

Formaðurin í Rættarnevndini ivast.

– Tað kundi hent seg, at vit útseta málið, men eg veit tað ikki enn. Nú hava Astrup og Hoydal kjakast í eitt heilt ár í fjølmiðlunum, síðan verður málið kastað niðan í tingið beint upp undir evstamark, og vit skulu taka støðu eftir stuttari tíð. Eg kundi hugsað mær eina hoyring, har vit fáa allar partar at greiða frá sínum sjónarmiðum, so vit vóru betur íløtin at taka eina skilagóða støðu, sigur Jógvan á Lakjuni.

# Læra frá vøggu til grøv



*Henda myndin varð tikin, tá Alfred Petersen, formaður í nevndini, handaði álitið til Høgna Hoydal, landsstýrismann tann 24. mars í ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Komandi tingsetu verður eitt uppskot langt fram á tingi um yrkisskeið og førleikamenning fyri arbeiðsfólk. Fyri stuttum handaði ein arbeiðsbólkur landsstýrismanninum álit um yrkisskeið. Talan er um eitt uppskot, sum mælir til víðfevnd eftirútbúgvingartilboð fyri øll, ið hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin**

ÁLIT
*Ingrid Bjarnastein*

Mánadagin varð kunnandi fundur hildin fyri løgtingslimum um álit um yrkisskeið. Talan er um eitt uppskot, sum mælir til víðfevnd eftirútbúgvingartilboð fyri øll, sum hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin, antin um tey eru í arbeiði, men eisini um tey eru arbeiðsleys.

– Grundtankin er tann, at tú gongur í skúla alt lívið, og tú eigur at kunna halda áfram við at útbúgva teg, meðan tú ert á arbeiðsmarknaðinum. Hetta fer at geva møguleika til fólk á til dømis flakavirkjum at fáa prógv uppá tað, sum tey longu hava lært, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í skúlamálum.

Ein arbeiðsbólkur hevur síðani í oktober mánaði í fjør havt fundir, og í mars mánaði varð álitið handað landsstýrismanninum.

– Ein nevnd uppá 13 fólk hevur sitið og arbeitt við álitinum, og sum nakað heilt serligt, vartað ein samd nevnd, sum legði álitið fram. Tað er vinnan sjálv, sum hevur ynskt hetta, og tað verður eisini vinnan sjálv, sum kemur at standa fyri meginpartin av fíggingini, sigur Høgni Hoydal.

## Lívslang læra

Alfred Petersen, sakførari, er formaður í nevndini, sum hevur arbeitt við álitinum. Hann greiðir soleiðis frá arbeiðsgongdini:

– Vit býttu okkum upp í fýra bólkar, har vit arbeiddu vit ymiskum uppgávum hvør, og síðani savnaðu alt saman í eina heild. Tað er serliga kostnaðurin, sum er áhugaverdur, tí um ein arbeiðsgevari verður biðin um at halda eitt skeið, so skal hann gera tað og eisini gjalda fyri tað.

Nevndin kallar hesar møguleikarnar fyri lívslanga læru. Vinnan mennist alsamt og starvsfólkini eiga tí eisini at mennast við henni.

– At ganga í skúla er ikki avmarkað til frá tí tú ert 7 til tú ert til dømis 20. Skúli er nakað, tú hevur brúk fyri alt lívið. Okkara mál er millum annað at geva virkisføra til øll, eisini arbeiðsleys og vinnutarnað, umframt at tað fer at gera eina lønsama og meira kappingarføra vinnu, sigur Hans Andrias Dam Joensen frá Mentamálaráðnum.

Lagt verður upp til brúka verandi umstøður, sum longu eru í landinum. Tað verið seg skúlar og lærarar, og harafturat verður tosað um, at fólk, sum leingi hava arbeitt í vinnuni, kunnu brúkast sum lærarar.

Eisini verður lagt upp til fjarundirvísing frá teimum smærru plássunum í Føroyum, og at brúka skúlar í útjaðarinum, so alt ikki kemur at vera á meginlandinum.

Álitið er somuleiðis eisini eitt lógaruppskot, sum verður lagt fram á tingi beint eftir ólavsøku, og er Høgni Hoydal sannførdur um, at uppskotið fer at verða væl móttikið.

– Hetta er eitt lógaruppskot, sum ikki fer at geva Landskassanum tær stóru útreiðslurnar, tí tað eru arbeiðsplássini, sum skulu gjalda, og á kunningarfundinum í dag, tóku løgtingslimirnir væl ímóti hesum, sigur Høgni Hoydal, sum tó leggur afturat, at tað var so sum so við uppmøting.

Í og við at fólk fáa møguleika til yrkisskeið, verða yrkisskeiðini góðkend av almennu myndugleikunum, og kunnu tey tí eisini verða nýtt til prógv uttanlands.

Høgni Hoydal metir tað verða av stórum týdningi, at fáa hetta uppskotið ígjøgnum so skjótt sum gjørligt, og tí verður tað lagt fram á tingi fyrst í komandi tingsetu.

# Spennandi tiltøk á Giljanes

TILTØK
*Ingrid Bjarnastein*

FSV-stuðlar skipa páskaaftan fyri fleiri tiltøkum á Giljanesi. Byrjað verður longu klokkan 15, tá klovnurin Fjotti og Gandakallurin Ásbjørn fara at undirhalda, og Óluva Dam fer at syngja. Harafturat verður páskareggjatombola við páskareggum, bamsum og sodavatn.

Seinni um kvøldið verður skipað fyri stórari gospelkonsert. Tá verða tað bólkarnir I am, MMM, Chain og Braquet, sum fara at spæla.

Annað páskakvøld verður skipað fyri eini rock konsert. Tá verða fleiri kendir og vælumtóktir tónleikabólkar við, harav fleiri av teimum hava luttikið á Prix Føroyum í ár. Talan er um Mind´s Eye, Flux, Rok og Fluffy Toys. Henda konsertin byrjar á midnátt.



# Váttar tilburð – verjir atburð



*Ljóskastarin varð settur á atburðin hjá Páll á Reynatúgvu, tá hann eftir øllum at døma var ófantaligur við tíðindafólk. Hansara floksformaður verjir hann og vendir í staðin kanónunum ímóti sjónvarpinum*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Formaður Tjóðveldisfloksins hevur svarað kæruni frá Sjónvarpi Føroya um framferðina hjá Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni. Hann verjir sín mann og leggur ikki fingrarnar ímillum í sínari atfinning móti sjónvarpinum. Álitið á tíðindaviðgerðina í SvF hevur fingið eitt sera, sera álvarsligt afturstig, sigur Høgni Hoydal millum annað**

AFTURSVAR
*Ingi Rasmussen*

Tjóðveldisflokkurin og Sjónvarp Føroya eru í hornatøkum.

Tað sæst týðiliga av drúgva brævaskiftinum millum flokkin og miðilin, sum hava havt vánalig viðurskifti sínámillum síðan seinastu samgongukreppuna. Sosialurin hevur fingið innlit í alt brævaskiftið.

Í vikuni, sum fór, svaraði Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, teirri kæruni aftur, sum sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal sendi vegna síni starvsfólk, ið kendu seg hótt av Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni. Sjónvarpsstjórin fýltist millum annað á, at Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður, hevði blakað eitt tíðindafólk út úr Almannaráðnum »í sansaleysari øði«, og at sami landsstýrismaður seinni hevði hótt ein tíðindamann í kaffikøkinum hjá løgtinginum við persónligari forfylging.

Svarið hjá Høgna Hoydal, sum telur heilar sjey síður, váttar, at hendingarnar eru farnar fram. Men hann gevur kortini ikki sjónvarpinum viðhald og verjir atburðin hjá landsstýrismanninum.

## Skjeyt við skørpum

Formaðurin byggir sítt svar á frágreiðing frá Páll á Reynatúgvu sjálvum. Sambært hesum breyt sjónvarpið eina avtalu, tá eitt tíðindafólk var sent á staðið, tí loyvi varð bert givið at taka myndir. Tá so tíðindakvinnan kortini bað um viðmerkingar, fyrst frá landsstýrismanninum og síðan aðalstjóranum, so bað hann hana fara út úr fundarhølunum.

»Hann var kontantur, men at brúka orð sum "sansaleys øði" og at "leggja seg fysiskt ímillum" er ein skeiv og einvís útlegging, leggur Páll á Reynatúgvu dent á«, skrivar Høgni Hoydal í svarinum.

Næsta hendingin, sum SvF kærir um, fór fram í kjallaranum í tinghúsinum. Páll á Reynatúgvu váttar, at hann gjørdi speiskar viðmerkingar til eitt tíðindafólk hjá SvF um tíðindaflutningin í Degi og viku um eitt innslag um Tjóðveldisflokkin.

»Tí segði hann í svørtum skemti, at nú fór hann hinvegin at savna upplýsingar um journalistar, sum kundi brúkast ímoti teimum. Hann hevði ikki droymt um, at tað, sum verður sagt í tinghúskjallaranum, varð fatað sum annað enn skemt, tí hetta vita øll tíðindafólk, sum hava sína gongd í tinginum, at har verður skotið við skørpum hvønn dag«, skrivar Høgni Hoydal í sínum svari.

## Álit fekk afturstig

Alt byrjaði við einum innslagi í Degi og viku, har sjónvarpið legði Tjóðveldisflokkin undir at spæla sjónleik í sambandi við eina samgongukreppu, har samstarvið eftir øllum at døma hekk í leysum tráði.

Høgni Hoydal kærdi innslagið, sum hann segði vera beinleiðis ósatt. Hann hevðist eisini at sjónvarpinum fyri at gera søgur uttan at geva tí ákærda møguleika at svara fyri seg.

Tað var eisini hetta, sum fekk øði í Páll á Reynatúgvu.

Í svarinum til SvF finst Høgni Hoydal eisini at fleiri øðrum málum, har Dagur og vika hava gjørt niðurstøður og sátt iva um trúvirði hjá persónum í Tjóðveldisflokkinum, uttan at teir hava fingið høvi at vart seg

»Tá kann eg ikki koma til nakra aðra niðurstøðu enn, at mítt álit á tíðindaviðgerðina í SvF hevur fingið eitt sera, sera álvarsligt afturstig. Eg kann als ikki góðtaka slíka viðgerð og kann ikki hava álit á nøkrum samskifti við tey tíðindafólk, sum gera slíkt,« skrivar Høgni Hoydal og váttar sostatt, at talan er um eitt álitisbrot við tann stovn, sum hann áður arbeiddi fyri.

Kortini sigur hann seg vóna, at til ber at fáa eitt samskifti í lag, sum kann greiða, hvørjar spælireglur eru galdandi millum fjølmiðlafólk og politikarar – í hesum føri serliga millum tíðindafólk hjá SvF og Tjóðveldisflokkin.

Mikkjal Helmsdal hevur enn ikki svarað brævinum frá Høgna Hoydal. Tá verður so enn ein kapitull skrivaður um hólmgonguna millum miðilin og flokkin.

# Páll bjóðar SvF av

**Sjónvarp Føroya hevur fingið eina bílegging frá Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni, um eina hólmgongu millum seg og tíðindastovnin, sum hevur kært hann fyri floksformannin**

HOLMGONGA
*Ingi Rasmussen*

Páll á Reynatúgvu vil gjarna sleppa framat senditíðini hjá sjónvarpinum.

Síðan Sjónvarp Føroya kærdi Páll á Reynatúgvu fyri at hava hótt tíðindafólk, hevur hann verið pírin við viðmerkingum til fjølmiðlarnar. Og tí er málið mest lýst frá sjónvarpsins síðu.

Í teldupost-samskifti við SvF, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, sæst, at Páll á Reynatúgvu helst vil gera sínar viðmerkingar í SvF. Og helst í einari beinleiðis hólmgongu við tíðindastovnin.

Hann skrivar soleiðis í teldubrævi til sjónvarpsstjóran, tann 4. apríl:

»Tíðindaverðin sóknast eftir einari viðmerking frá undirritaða viðvíkjandi støðuni okkara millum, sprottin seinastu vikurnar. Tað hevði verið ynskiligt at gjørt viðmerking til málið, men best av øllum var, um eg fekk høvi at viðmerkt støðu mína á røttum palli. Á heimavøllinum hjá tykkum, beinleiðis í SvF.

Haldi eisini, at tað hevði verið ein meira virðilig viðgerð fyri allar partar. Tit ímóti mær. Og latið so fólkið gera av, hvør stendur seg best í trúvirði. Mær hevur ongantíð dámt skuggaboksing, ella tað at lata onnur føra mína sak á øðrum pallum. Skal tú í »infight«, so krevur tað dirvi í fullum dagslýsi. Eg eri tilreiðar. Eru tit?«.